# Skjal 2 í løgtingsmáli nr. 63/2008
# - Frágreiðing 2008

## Frágreiðing til Løgtingið um virki ráðsins

1. **Inngangur**

Vísandi til lóg um sendinevnd Føroya til Norðurlandaráðið § 3 lata føroysku limirnir í Norðurlandaráðnum, Katrin Dahl Jakobsen og Jenis av Rana, hervið Løgtinginum árligu frágreiðingina um, hvat er farið fram í Norðurlandaráðnum í 2008.

2. **Bygnaðurin av Norðurlandaráðnum**

Norðurlandaráðið, ið er stovnsett í 1952, er samstarvsforum hjá parlamentarikarunum í Norðurlondum. Ráðið hevur 87 limir, sum umboða tey fimm londini og tey trý sjálvstýrandi økini. Ráðslimirnir sita í tingunum í londunum og verða tilnevndir av flokkunum har.

Føroyar luttaka sbr. "lov nr. 185 af 28.04.1971 om nordisk samarbejde", sum seinast broytt við "lov nr. 220 af 16.05.1984", og løgtingslóg nr. 33 frá 26.06.1973 um sendinevnd Føroya til Norrøna ráðið, sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 10.05.1984.

Sáttmálin, sum setir karmarnar um virksemi Norðurlandaráðsins og Norðurlendska ráðharraráðsins, kallast Helsingforssáttmálin. Hann varð fyrstu ferð undirskrivaður av stjórnunum í Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark í Helsingfors 23. mars 1962.

**Nevndirnar undir Norðurlandaráðnum**
Norðurlandaráðið er skipað soleiðis, at nevndirnar líkjast nevndunum, ið eru í teimum ymisku tingunum í Norðurlondum. Nevndirnar eru fimm í tali:

**Mentanar- og útbúgvingarnevndin (14 limir)**
**Trivnaðarnevndin (15 limir)**
**Medborgara- og brúkaranevndin (15 limir)**
**Umhvørvis- og náttúrutilfeingisnevndin (15 limir)**
**Vinnunevndin (14 limir)**

Umframt hesar nevndir eru eisini Presidiet, Budgetgruppen, Kontrolkomitten og Valkomitten.

Føroyar vóru umboðaðar í Mentanar- og útbúgvingarnevndini, har Katrin Dahl Jakobsen hevur havt sæti, og Umhvørvis- og náttúrutilfeingisnevndini, har Jenis av Rana hevur havt sæti.

**Floksbólkarnir**
Tinglimirnir í Norðurlandaráðnum skipa seg í fýra floksbólkar, tey konservativu, miðflokkarnir, javnaðarflokkarnir og vinstrasosialistarnir.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Miðbólkurin: | 23 | frá | 17 | nasjonalum flokkum |
| Javnaðarbólkurin : | 28 | - | 8 | - - |
| Konservativi bólkurin: | 19 | - | 7 | - - |
| Vinstrasosialistiski bólkurin: | 9 | - | 7 | - - |
| Uttanflokka: | 8 | - | 2 | - - |

Nevndarsessir og aðrir sessir saman við uppskotum verða viðgjørd í floksbólkunum, áðrenn tey koma fyri í nevndunum og ráðnum.

**Føroyska sendinevndin**
Sambært reglunum um, at umboðini skulu veljast fyri hvørja tingsetu.
Fyri tingsetuna 2007 valdi Løgtingið 3. august 2007

Jógvan við Keldu (varamaður: Óli Breckmann)
Kára P. Højgaard (varamaður: Lisbeth L. Petersen)

Fyri tingsetuna 2007, aftan á valið 19. januar 2008, valdi Løgtingið 13. februar 2008

Sjúrð Skaale (varamaður: Heidi Petersen)
Kaj Leo Johannesen (varamaður: Kári P. Højgaard)

Sjúrður Skaale er síðan farin í farloyvi, og hevur Heidi Petersen tí tikið sætið.
Heidi Petersen verður limur í Vinstrasosialistiska bólkinum og limur í í mentanar- og útbúgvingarnevndini, meðan Kaj Leo Johannesen verður limur i miðbólkinum og limur í umhvørvis- og náttúrutilfeingisnevndini.

Tað eyðnaðist ikki tinginum at fáa valt nýggjar limir fyri 2008, áðrenn nýggj samgonga varð skipað 26. september 2008.
Fyri tingsetuna 2008 valdi Løgtingið 30. september 2008

Katrin Dahl Jakobsen (varamaður: Andrias Petersen)
Jenis av Rana (varamaður: Karsten Hansen)

## Yvirlit yvir fundir í Norðurlandaráðnum í 2008, har føroysku limirnir hava luttikið

*Ráðs- og nevndarfundir 29. – 30. januar í Stockholmi*
Av tí at nýggj føroysk umboð ikki enn vóru vald aftan á valið 19. januar, var einki føroyskt umboð við á fundinum.

*Ráðs- og nevndarfundir 13. – 15. apríl í Stavanger*
Úr Føroyum luttók Heidi Petersen og Kaj Leo Johannesen.

At Stavanger var valdur til evropeiskan mentanarhøvuðsstað fyri 2008 gjørdi, at mentanin stóð frammarlaga á skránni á hesum norðulensku fundunum. Á fundinum í mentanarnevndini kunngjørdi formaðurin, Lars Vegendal, at hann legði frá sær. Hetta var sum mótmæli móti niðurskurðinum í játtanini í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2009, sum ráðharraráðið hevði lagt fram.

*Ráðs- og nevndarfundir 23. – 24. september í Reykjavik*
Úr Føroyum luttóku Sjúrður Skaale og Kári P. Højgaard.

*Summarfundur mentanarnevndarinnar í Suðurjútlandi 23. – 26. juni*
Mentanarnevndin var í Suðurjútlandi og helt summarfund, og varð har kunnað um serligu viðurskiftini, sum vóru galdandi í einum marknaðarøki. Nevndin var eisini í Flensburg, har m.a. varð vitjað á umboðsstovu Norðurlandaráðsins har. Heidi Petersen umboðaði Føroyar.

*Summarfundur umhvørvisnevndarinnar í Hvítarusslandi og Ukraina 23. – 26. jun.*
Umhvørvisnevndin var í Hvítarusslandi og Ukraina. Umhvørvi var høvuðsevni, serliga at síggja kjarnorkuverkini. Kaj Leo Johannesen luttók.

*60. ársfundur Norðurlandaráðsins 30. oktober –1. november í Helsinki*
Ársfundur Norðurlandaráðsins verður hildin um heystið, har parlamentarikarar taka avgerðir um teir spurningar, teir ynskja, at tær norðurlendsku stjórnirnar skulu finna loysnirnar á. Á ársfundinum luttaka bæði parlamentarikarar, ráðharrar og landsstýrismenn, men bara parlamentarikararnir hava atkvøðurætt.
Úr Løgtinginum luttóku Katrin Dahl Jakobsen og Karsten Hansen

Við árskiftið fer formansskapurin fyri Norðurlendska Ráðharraráðið úr Norra til Íslands, meðan Svøríki tekur yvir formansskapin fyri Norðurlandaráðið eftir Finnland. Nýggi forseti Norðurlandaráðsins er sviin Sinikka Bohlin, ið avloysir Erkki Tuomioju úr Finlandi.